# BILATORGIÐ

**Føroyski brúktbilamarknaðurin - í Sosialinum hvønn hósdag**







**CITROEN SAXO 1.5D 3H**
Árg Jan´01, Km 35.000 .
Kr. 108.000.



**MITSUBISHI GALANT 1.8 GLSI 4H**
Árg Jun'92, Km 187.000 . sýn 02.
Kr. 35.000.

**HYUNDAI ATOS 1.0**
Árg Apríl'01, Km 22.000 .
Kr. 77.000.



**CITROEN XSARA 2.0I LIMITE WEEK.**
Árg Apríl'99, Km 28.000 . sýn 11-02. Kr. 128.000.



**SUZUKI BALENO 1.6I 4H**
Árg Apríl'00, Km 27.500 .
Kr. 105.000.



**NISSAN ALMERA 1.4I**
Árg Okt'98, Km 64.000 .
Kr. 83.000.



**CITROEN XSARA 2.0 HDI**
Árg Nov'99, Km 95.000 .
Kr. 130.000.



**TOYOTA COROLLA 1.3I**
Árg Feb'01, Km 24.000.
Kr. 110.000.

**CITROEN JUMPER 2.5TD LH**
Árg Aug'96, Km 120.000.
Kr. 120.000.



**CITROEN JUMPY 1.9TD**
Árg Nov'99, Km 26.000.
Kr. 115.000.



**NISSAN SERENA 2.3D**
Árg Mai'97, Km 88.000.
Kr. 92.000.



**TOYOTA HI-LUX 2.4D 4X4 4H**
Árg Juni'94, Km 95.000.
Kr. 110.000.

CITROËN Mercedes-Benz MITSUBISHI MOTORS
**Ivan Johansen Bilar**
Tel 313666 • www.ivan.fo •e-mail: ivan@ivan.fo



**SUBARU LEGACY 2.0 GL**
Árg des.93, Km 225.000. "sýnaður 29.09.02. . Kr. 59.000.
Uttan bil í býti kr. 49.000



**VW GOLF 1.8**
Árg okt. 95, Km 101.000. "sýnaður 10.01.02.. Kr. 93.000.
Uttan bil í býti kr. 83.000



**CITROEN XSARA 1.9 HDI - STW**
Árg jun. 98, Km 112.000. "sýnaður 06.09.02 - . Kr. 124.000.
Uttan býtisbil kr. 110.000.



**TOYOTA AVENSIS 2.0 D-4D**
Árg mar.00´, Km 60.000.
Kr. 175.000.
Uttan býtisbil kr. 160.000



**OPEL ASTRA 1.8 STW**
Árg okt. 95, Km 64.000. "sýnaður .
Kr. 79.000.
Uttan býtisbil kr. 69.000



**RENAULT LAGUNA 1.8 H/B**
Árg okt. 01, Km 19.000. . Kr. 199.000.
Uttan býtisbil kr. 189.000



**TOYOTA COROLLA 2.0D - STW**
Árg mar. 96, Km 105.000.
"sýnaður 18.09.02. .
Uttan býtisbil 90.000



**PEUGEOT 106**
Árg aug. 97, Km 58.000. "sýnaður 31.05.02. Kr. 79.000.
Uttan býtisbil kr. 69.000



**PEUGEOT 405 GTX TD**
Árg des.95, Km 168.000. "sýnaður 04.09.00. Kr. 79.000.
Uttan býtisbil kr. 65000

**TOYOTA CARINA 1.6 STW**
Árg mei.89, Km 145.000. "sýnaður 04.07.02. Kr. 45.000.
Uttan býtisbil kr. 38.000



**RENAULT MEGANE 1.6 SEDAN**
Árg jun 00, Km 64.000.
Kr. 129.000.
Uttan býtisbil kr. 119.000

VOLVO RENAULT
VR BILAR
Hoyvíksvegur
tel 322110




# Eitt spæl fyri gallarínum

**Stóru samgonguflokkarnir skapa ótta millum fólk, heldur Jenis av Rana, formaður í Miðflokkinum. Hann kallar almennu ósemjuna millum Fólkaflokkin og Tjóðveldisflokkin fyri ein glæntrileik, tí hóast alt er ikki so stór ósemja um fíggjarlógina, sigur hann**

SAMGONGUROK
*Ingi Rasmussen*



*Smílandi og samdir. So góðir vinir vóru Karsten Hansen og Óli Breckmann týsdagin. Dagin fyri kastaðu teir hvørjum øðrum líkt og ólíkt fyri. Ein glæntrileik kallar Jenis av Rana orðadráttin millum stóru samgonguflokkarnar síðstu dagarnar*

Almenna ósemjan í samgonguni er bara eitt spæl fyri gallarínum, har høvuðkambarnir royna at markera seg.

Soleiðis sigur Jenis av Rana, formaður í Miðflokkinum, til harðligu samanbrestirnar millum Fólkaflokkin og Tjóðveldisflokkin seinastu dagarnar í sambandi við fíggjarlógina.

## Brigsl og agg

Brigsl, gamalt agg og vánaligt stev í samgonguni verður alment stillað fram í hesum døgum.

Óli Breckmann, formaður í tingbólki Fólkaflokksins, gav alment til kennar í Degi og viku týskvøldið, at landsstýrismenninir hjá Fólkaflokkinum gera eitt betri arbeiði enn teir hjá hinum samgonguflokkunum.

Formaðurin í Tjóðveldisflokkinum Høgni Hoydal førir hinvegin fram, at Óli Breckmann spælir sjónleik, førir flokspolitikk og hugsar persónligt, í staðin fyri at føra politikk tjóðini at gagni.

Sostatt royna partarnir at øsa hvønn annan, hóast teir fyri fáum mánaðum síðani hava svorið hvørjum øðrum trúskap í einum samgonguskjali.

## Ein glæntrileikur

Einastaðni mitt ímillum skotgravirnar standa hinir báðu smáu samgonguflokkarnir, Miðflokkurin og Sjálvstýrisflokkurin.

Jenis av Rana, formaður í Miðflokkinum, talar nú harðliga at stóru samgonguflokkunum og serliga Óla Breckmann.

– Tað hoyrir ongastaðni heima, sum Óli Breckmann hevur gjørt, sigur hann og sipar til kravboðini um sparingar til landsstýrismenninar.

Jenis av Rana heldur alt hóvastákið verður tann reini glæntrileikur, har Tjóðveldisflokkurin eisini hevur havt ein høvuðsleiklut.

– Ósemjan í samgonguni er ikki so ógvuslig, sum hon tykist. Tað vísti samgongufundurin mánadagin, sum m.a. snúði seg um fíggjarlógina. Menn sluppu at rasa út, men annars var bara friðarligt, tá ongar mikrofonir vóru tendraðar, sigur Jenis av Rana.

## Skapa ótta

Stóri trupulleikin við almennu samgonguósemjuni, sum kemur til sjóndar, heldur hann vera, at fólk gerast óttafull. Sparingar eru í lagi, men tær koma ikki upp í tær hæddirnar, sum fíggjarnevndarformaðurin hevur givið landsstýrismonnunum boð um.

– Fólkaflokkurin og Tjóðveldisflokkurin skapa ótta millum fólk. Teir fáa fólk at halda, at ein kreppa er á veg í Føroyum, men tað er tað onki, sum bendir á, hóast vøksturin kanska ikki heldur fram, sigur Jenis av Rana.

Hóast alt rokið, sum hevur staðist burturúr útmeldingum um sparingum, so heldur formaðurin í Miðflokkinum, at tað kann vera gagnligt.

– Tað fær fólk at síggja, at tað er neyðugt at halda aftur, tá tíðirnar eru so góðar. Høvdu vit hava slíkt kjak í 80-árunum, so fingu vit ikki so ógvusliga kreppu, men tá mutaði ongin ímóti almennu ovurnýtsluni. Kanska er hetta kjakið eitt prógv fyri, at vit hóast alt hava lært nakað, sigur Jenis av Rana.


Jólatilboð:
Danmark
frá 1.955,-
Keypmannahavn frá kr. 1.955,- t/r
Billund frá kr. 1.993,- t/r
Spyr eisini um prísir til Odense, Århus og Aalborg.
Ferðatíðarskeiðið er frá 10. desember 2002 til 5. januar 2003.
Ferðaseðlar skulu keypast í seinasta lagi 7 dagar áðrenn fráferð.
Serligar treytir eru galdandi fyri hesar ferðaseðlar og avmarkað pláss er á hvørjum túri. Nógvur barnaavsláttur verður givin.
Vend tær til tína ferðaskrivstovu ella Maersk Air tlf. +45 70 10 74 74
MAERSK AIR
It's got to be perfect